# Semja

**millum P/F Hvalnes og manningarfeløgini.**

Partarnir eru samdir um at gera hesar broytingar í sersáttmálanum fyri M/S Norborg

1. Landingarútreiðslur verða loyvdar sum felagsútreiðslur.

2. Býtisprosentið er 28 % við 30 monnum. Býtisprosentið hækkar og lækkar við 0,45 % tá ið manningartalið ávikavíst hækkar ella lækkar í mun til 30.
Dømi:

| | |
|---|---|
| 31 mans | 28,45 % |
| 30 mans | 28,00 % |
| 29 mans | 27,55 % |
| 28 mans | 27,10 % |
| 27 mans | 26,65 % |
| 26 mans | 26,20 % |
| 25 mans | 25,75 % |
| 24 mans | 25,30 % |
| 23 mans | 24,85 % |
| 22 mans | 24,40 % |

3. Eykapartar verða læstir fastir við einum manningartali upp á 30.

4. Hesar broytingar verða gjørdar í verandi sáttmála:

   a. Strika - henda avtala verður endurskoðað, tá fyrsta tíðarskeiðið samb. stk 2 er av.
   b. Strika orðingina í stk. 2, pkt. 2. – Fyrsta tíðarskeiðið verður frá byrjan til endan á summarsildafiskiskapinum.
   c. Broyta pkt. 5 í stk 2 – Frá: Avloysarar fáa ta dagløn, sum er galdandi í tí tíðarskeiðinum viðkomandi er umborð Til: Avloysari fær útgoldna forskotsløn, sum liggur nær teirri væntaðu endaligur daglønini. Uppgjørt verður, tá ið árið er liðugt.

5. Partarnir eru samdir um, at trupulleikin við hækkandi brennioljukostnaði kann takast upp til viðgerðar, tá ið hesin sáttmáli skal endurnýggjast.

6. Felagsreglur í sáttmálanum við Føroya Reiðarafelag frá 2009 galda.

Tórshavn 1. februar 2011

**P/F Hvalnes**
Kristian Martin Rasmussen

**Fiskimannafelagið**
Jan Højgaard

**Maskinmeistarafelagið**
Páll Hansen

**Føroya Skipara- og Navigatørfelag**
Eyðstein Djurhuus

# Rættingar í sáttmálanum millum P/F Hvalnes, Nótaskip og Føroya Fiskimannafelag 1 feb 2011.

Eftirløn: parturin hjá Reiðaranum er 40 kr pr dag og parturin hjá fiskimonnum er 4% av hýruni.

Trygdarskeið: Reiðarin rindar fyri nýtt trygdarskeið og læknaváttan, um maður hevur hoyrt til skipið í 6 mánaðir.

Trygdargrunnur Fiskivinnurnar: Føroya Fiskimannafelag rindar inn í grunnin av óbýttum.

Tórshavn
4 mai 2011.

Vegna
P/F Hvalnes/Nótaskip

------------------------------

Jógvan Jespersen

Vegna
Føroya Fiskimannafelag

------------------------------

Jan Højgaard